## Avhoyra agentin

Umboð fyri svensku løgregluna eru farin til eitt land í Asia at avhoyra tann fyrrverandi suðurafrikanska agentin, sum nú verður lagdur undir at hava myrt svenska forsætisráðharran, Olof Palme.

Blaðið Expressen skrivaði um vikuskiftið, at suðurafrikanarin hevði sjálvur ringt til svensku løgregluna og biðið um at verða avhoyrdur. Maðurin hevði sagt, at hann var illa við av tíðindunum um, at hann var drápsmaðurin, og at hann tí vildi siga svensku løgregluni sína søgu fyri at prógva, at hann er ósekur.

Svenska løgreglan hevur alla tíðina víst tíðindunum um tann suðurafrikanska agentin aftur, men tá maðurin sjálvur bað um at verða avhoyrdur, valdi løgreglan at taka av.

## Altjóða fátækragrunn

Nývaldi brasilski forsetin, Luiz Inacio da Silva, kom á altjóða búskaparfundinum í Davos við uppskoti um at stovna ein altjóða fátækragrunn. Hann vísti á, at ofta eru tað fátækradømi og hungur, sum elva til vantandi tolsemi og víðgongdar rørslur, og tí helt hann, at heimsins ríku lond eiga at fara í hernað ímóti fátækradøminum.

Lula, sum forsetin vanliga verður róptur, mælti teimum ríku londunum í G7-bólkinum til at stovna grunnin við stuðuli frá altjóða ileggjarum. Hann segði, at grunnurin eigur millum annað at virka fyri, at tann tøkniligi og vísindaligi framburðurin í teimum ríku londunum skal breiðast út um heimin, so tey fátæku londini eisini fáa gagn av honum.

Boðskapurin hjá brasilska forsetanum er tann sami, sum hann nevndi í einari røðu, sum hann helt í Porto Alegre í Brasil fyri nøkrum døgum síðani, har umleið 100.000 fólk vóru komin saman at umrøða átrokandi sosialar spurningar.

## Sleppur kanska aftur at ferðast

Uttanríkisráðharrarnir í ES-londunum skuldu í gjár taka støðu til, hvørt tiltøkini ímóti Zimbabwe skulu leingjast ella broytast.

Eitt av tiltøkunum sigur, at teir politisku leiðararnir í Zimbabwe, teirra millum Robert Mugabe, forseti, eiga ikki at sleppa at ferðast uttanlands, men hetta verður eftir øllum at døma broytt. Í hvussu er hevur franska stjórnin boðið Mugabe til París í næsta mánað, tá afrikanskir leiðarar skulu halda toppfund har. Galdandi ferðabannið hjá ES fer úr gildi tann 18. februar, og fundurin í París byrjar tríggjar dagar seinni.

Bretland hevur gingið á odda í royndunum at avmarka møguleikarnar hjá politisku leiðarunum í Zimbabwe, og í gjár var ógreitt, um bretska stjórnin er sinnað at lata Mugabe sleppa til Fraklands.

## Skuldi skjóta hundin, men doyði sjálvur

Tann 43 ára gamli amerikanarin Raymond Poore var vorðin so troyttur av hundinum, sum hann og konan høvdu, at um vikuskiftið gjørdi hann av at avlíva hundin, sum var av kinesiska slagnum Shar Pei.

Raymond Poore ringdi til konu sína og segði henni, at hann nú hevði gjørt av at avlíva hundin, men tá konan kom heim frá arbeiði, fann hon mannin deyðan. Hundurin var haraftarímóti á lívi.

Løgreglan í Fairfax í statinum Virginia sigur, at Raymond Poore hevur eftir øllum at døma sligið hundin við skeftinum, men var so óheppin, at skotið gekk av av stoytinum og rakti hann í búkin. Kanningar hjá løgregluni staðfestu eisini hundahár uppi á skeftinum.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Vápnaeftirlitsmenninir fáa nýggja freist

**USA og Bretland eru sinnað at góðtaka, at ST-vápnaeftirlitsmenninir í Irak sleppa at halda fram við leitingararbeiðinum í Irak til tann 1. mars. Samstundis siga amerikanarar, at teir fara at almannakunngera prógv fyri, at Irak hevur hópoyðingarvápn**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Um vikuskiftið segði bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, í samrøðu við BBC-sjónvarpið, at Bretland var sinnað at lata vápnaeftirlitsmenninar í Irak fáa betri stundir at leita eftir hópoyðingarvápnum. Stutt eftir segði amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, í røðu í Davos í Sveits, at USA ætlaði sær ikki at leypa á Irak í dag ella í morgin, sum hann tók til. Hetta bendi á, at londini vóru farin at nærkast Fraklandi, Týsklandi og Russlandi, sum høvdu róð uppundir, at eftirlitsmenninir áttu at fáa betri tíð.

Í gjár skrivaði týska blaðið Die Welt frá einari keldu í bretsku stjórnini, at Bretland og USA vóru gingin við til at lata eftirlitsmenninar halda fram við leitingini til tann 1. mars. Ein orsøk til avgerðina varð søgd at vera, at tey bæði londini mugu fáa meiri tíð til at fyrireika seg til at leypa á Irak, skrivaði blaðið.

Sambært týska blaðnum hava amerikanararnir eisini gjørt av at taka sínar fregnartænastumenn úr Irak. Tað hevur leingi ljóðað, at menn hjá CIA og hernaðarligu fregnartænastuni hava verið í Irak í seinastuni, har teir hava savnað upplýsingar, sum skulu nýtast í einum møguligum álopi.

Fleiri hava kravt, at USA skal leggja fram prógv fyri, at Irak hevur tey hópoyðingarvápnini, sum amerikanarar og bretar siga landið hava, og í gjár segði Colin Powell við italska blaðið Corriere della Sera, at USA fer at almannakunngera ein part av prótvilfarinum, tá tað verður hildið ráðiligt.

### Búskaparligur fyrimunur

Samstundis sum amerikanarar fyrireika seg til kríggj, hevur ein frágreiðing staðfest, at eitt stutt kríggj við Irak fer at bera í sær, at oljuprísurin fer at fella, og at gongd kemur á amerikanska búskapin. Men frágreiðingin sigur eisini, at verður kríggið drúgvt, fer tað at fáa ta øvugtu ávirkanina.

Tað er arbeiðsgevarafelagsskapurin Institute of Directors, sum hevur skrivað frágreiðingina, og felagsskapurin væntar, at eitt stutt kríggj fer at gera, at oljuprísurin fer at fella einar tíggju dollarar fyri tunnuna, so hann fer at liggja um 20 dollarar.

Arbeiðsgevarafelagsskapurin sigur, at eitt stutt kríggj fer at hjálpa George W. Bush, forseta at fáa Kongressina at taka undir við teimum búskapartiltøkunum, sum forsetin ætlar at legggja fram um stutta tíð. Tiltøkini eru ætlað at stimbra amerikanska búskapin.

# Tað verður Sharon

**Eingin ivi er um, at Ariel Sharon fer at endurvinna forsætisráðharrasessin í Ísrael á tjóðartingsvalinum í dag**

*Hóast 700 ísraelsmenn hava latið lív í yvirgangsatsóknum, síðani Ariel Sharon tók við sum forsætisráðharri, halda ísraelsmenn framvegis, at hann er besta borganin fyri fólksins trygd.*

ÍSRAEL
*Árni Joensen:*

Likudflokkurin hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra liggur klárt framman fyri Arbeiðaraflokkin, nú ísraelsmenn skulu manna tjóðartingið Knesset av nýggjum.

Tær seinastu veljarakanningarnar, sum vórðu almannakunngjørdar í gjár, søgdu, at Likudflokkurin verður landsins størsti flokkur, og at høgrasamgongan hjá Sharon ætlandi fær 65 av teimum 120 sessunum í tinginum.

Sharon hevur í valstríðnum sagt, at hann fer at bjóða Arbeiðaraflokkinum at skipa samgongu við sær, men formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Amram Mitzna, hevur svarað, at hann ætlar sær ikki at vera eitt fikublað í stjórnini hjá Sharon. Arbeiðaraflokkurin var í samgongu við Likud, men tók seg burtur úr samgonguni í oktober í fjør.

Eins og í valstríðnum í 2001 hevur Ariel Sharon lovað at veita ísraelska fólkinum trygd, verður hann valdur, og hóast meiri enn 700 ísraelsmenn eru deyðir í yvirgangsatsóknum hesi bæði árini, bendir alt á, at veljararnir framvegis hava álit á tí 74 ára gamla generalinum og góðseigaranum.

Sharon varð fyrstu ferð valdur í Knesset í 1977, og hann gjørdist ráðharri fyrstu ferð í 1982.

# Fyrsta flogferðin í 53 ár

**Fyri fyrstu ferð í meiri enn 50 ár hevur eitt ferðamannaflogfar flogið millum Taiwan og Kina**

KINA-TAIWAN
*Árni Joensen:*

Tað var ein søguligur tilburður, tá eitt Boeing-flogfar hjá China Airlines fór úr Shanghai til floghavnina í taiwanska høvuðsstaðnum Taipei sunnudagin. Umborð vóru 243 ferðafólk, og ferðin var tann fyrsta av sekstan flogferðum, sum skulu flyta taiwanskar ríkisborgarar úr Kina til Taiwan at halda nýggjárið, sum byrjar tann 1. februar.

Myndugleikarnir í Kina hava bannað flogsambandi við Taiwan síðani 1949, men nú hava myndugleikarnir fyribils loyvt teimum sekstan flogferðunum. Taiwansku myndugleikarnir sýta framvegis taiwanskum flogførum at flúgva til Kina, men stjórnin í Taipei hevur kortini sagt, at hon er sinnað at taka flogbannið av.

NR. 18 • TÝSDAGUR • 28. JANUAR 2003 • 77. ÁRGANGUR • WWW.SOSIALURIN.FO

### 1. umfar

Leygarkvøldið var fyrsta innleiðandi umfar í Prix Føroyum hildið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bólkarnir spældu í hesi røð:
Flux
S.C.A.T.G.O.H.
Headache Blues Treo
Søren Søgaard
MC Hár
Human Chaos

10 dómarar mettu um avrikini á pallinum, og teir dømdu út frá fimm ymiskum krøvum um millum annað tónleikaliga dygd, spæl og framførslu.

MC Hár vann og vann sær pláss í finaluni. Headache Blues Treo var nummar 2 og skal spæla í eini hálvfinalu saman við fýra øðrum bólkum, har ein vinnur eitt finaluplass.

# Rókur setti hini skákmát

**Popparin Rókur Jakobsen hevur seinastu árini sungið fýra bólkar í Prix-finaluna. Hann er næstan vorðin ein heilgardering hjá bólkum, sum vilja í finaluna. Hesaferð var hann jokari hjá MC Hár**

*– Eg eri ein poppari, og eg brenni veruliga fyri tí. Eg haldi, at tað hevur eydnast væl at drigið eitt sindur av poppi upp í tónleikin hjá MC Hár, og hinir tónleikararnir hava eisini dámt tað væl, sigur Rókur Jakobsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

RÓKUR
*Eyðun Klakstein*

Tá ið MC Hár kom upp á pallin, eftir at tað var greitt, at teir høvdu vunnið fyrsta innleiðandi umfarið í Prixnum, legði andaligi leiðarin í bólkinum, Niels Uni Dam, stóra ábyrgd á annan sangaran, Rókur Jakobsen.

– Hann hevur gjørt MC Hár meira popputar, og tí hevði hann fingið skyldina, um vit taptu í kvøld. Nú hava vit vunnið, so vit mugu eisini geva honum skyldina fyri tað, segði Niels Uni við einum skálkabrosi.

Rókur kvitteraði við at siga, at hann er komin í finaluna, hvørja fer hann hevur verið við í Prixnum.

Í 1999 sang hann bæði í Diatribes og í Tangz, og báðir bólkarnir komu í finaluna. Tá valdi hann bert at syngja í Tangz í finaluni. Fyri tveimum árum síðani var Tangz aftur við og kom í finaluna. Nú stóð MC Hár fyri tørni.

– Tað er næstan ein heilgardering av hava meg við í bólkinum. Nei, eg havi bara verið so heppin, at eg havi spælt saman við góðum tónleikarum, og tí hevur úrslitið verið gott, sigur Rókur beskeðin.

### Poppur

Rókur helt ikki, at hann hevði eina serliga ábyrgd hvílandi á sær leygarkvøldið, hóast teir vilja vera við, at hann hevur gjørt MC Hár til ein meira popputan bólk.

– Eg eri ein poppari, og eg brenni veruliga fyri tí. Eg haldi, at tað hevur eydnast væl at drigið eitt sindur av poppi upp í tónleikin hjá MC Hár, og hinir tónleikararnir hava eisini dámt tað væl, sigur Rókur.

– Tað var ótrúliga deiligt at vinna, men tað var eisini ein bittur sigur. Eg eri keddur av, at ein bólkur sum Flux noyddist at fara úr kappingini, sigur Rókur.

### Gott lag

Niels Uni Dam heldur, at popprákið í bólkinum ikki hevur verið so tilætlað.

– Rókur dugir ómetaliga væl at gera fangandi melodiir, og tað ger kanska, at tónleikurin kemur at ljóða meira popputur, heldur Niels Uni, sum hevur nógv rósandi orð at bera sangaranum í bólkinum.

– Rókur er eitt stórt talent. Hann er rættiliga komin við í bólkinum og er ein av teimum, sum hevur fingið stóran týdning fyri okkara tónleik.

Tróndur Bogason var høvuðsmaðurin, tá ið tað snúði seg um at gera tónleik í MC Hár, men síðani hann fór burtur úr bólkinum, hava hinir skulu fóta sær sum tónaskøld.

– Tað hevur eydnast væl, og tað er ein stór fragd at vera til venjingar og gera tónleik saman. Allir eru við í tí, og samstarvið er sera gott, sigur hann.

### Svøríki dregur

Rókur Jakobsen var í fjør á tónleikaskúla í Svøríki, men í løtuni gongur hann á lærdum háskúla í Danmark, har samfelagsfrøði stendur á skránni. Hann hevur hálvtannað ár eftir fyri at fáa BA, og eftir tað kemur tónleikur vónandi at fylla meira.

– Eg kundi hugsað mær at gjørt meira við tónleikin aftur, og Svøríki dregur. Tað er eitt gott land at vera í, og hóast tú kallar teg tónleikari, so er tað eingin, sum hyggur undarliga upp á teg, sigur hann.

Men næsta stóra uppgávan hjá Róki verður í finaluni í Prix Føroyum, tá ið hann og hinir tónleikararnir í MC Hár skulu royna at føra kærleikan til enn ein sigur.

## Frá apu til hár

Rókur Jakobsen kom fram sum annar av sangarunum, sum sang um apuna Charlie. Tað var fyri nógvum árum síðani. Síðan trumlaði hann alt niður saman við Tangz, hann skeykaði og rockaði sum Turbo-Petur, áðrenn hann varð tikin av fótum av berum kærleiki í MC Hár.

Á ólavsøkukonsertini í 2001 spældi hann fyrstu ferð saman við tí óskikkiliga rockbólkinum, og í summar gjørdist hann ein meira fastur partur av bólkinum.

Men hóast Tangz ikki hevur spæl nógv seinastu tvey árini, er bólkurin ikki farin í søguna. Rókur rættaði eisini upp á Niels Una, tá ið hann kallaði hann fyrrverandi sangara í Tangz. Tað er hann ikki, hann er framvegis sangari í Tangz.